# Bindicafé

**Týsdagin verður so-kallað bindicafé á Gallerí Jinx við Áarvegin**

BINDICAFÉ
*Tíðindaskriv*

Í okkara tíð er ikki neyðugt at duga at binda. Hóast hetta hava stokkarnir ikki verið nøkur óvanlig sjón í Føroyum seinnu árini, og Gallerí Jinx í Havn fara tey nú fyri aðru ferð at royna seg við sonevndari bindi-café.

Sagt verður, at hetta er ein roynd at hittast á ein heldur óvanligan hátt við stokkum. Ung og eldri fáa møguleika at hittast til hugna og samveru í einum nútíðar forum at fáa hugskot innan binding. Vónin er sjálvandi eisini, at nýhugsan innan binding sprettur úr hesum tiltaki.

At hittast til Bindicafé er eitt rák, sum er vorðið alsamt meira vanligt í londunum kring okkum, og á Gallerí Jinx verður tað hesaferð Ása Hátún, sum fer at siga frá føoyska sjallinum.




## Konsert á Margarinfabrikkini

**Fríggjakvøldið 23. janua kl 22, verður konsert á Margarinfabrikkini við bólkunum Speaker og Monkey Mongolia**

KONSERT
*Tíðindaskriv*

Konsertin er tann fyrsta í eini røð til tess at savna pening inn til ein Íslandstúr, har bólkarnir skulu spæla fyri Íslendskum ungdómum.

Speaker er ein fýramanna bólkur sum spælir eitt slag av sveimandi nýmótans rokki við einum sorgblíðum dæmi,men eisini er okkurt stuttligt lag og onkur glaður sangur í millum.

Monkey Mongolia eru seks unglingar sum spæla tað teir sjálvir nevna popp í tí tungara endanum.

Tað serliga við bólkinum er at teir eru tríggir guitarspælarar, so tað kann vera at teir larma eitt sindur við hvørt. Kanska var tað tað sum, gjørdi at teir vunnu POP TOPP konsertina.

Báðir bólkar eru virknir í ART umhvørvinum sum húsast á loftshæddini í Margarinfabrikkini.

Teir hava hvør sær luttikið á konsertum í eitt nú Margarinfabrikkini, KFUM, ólavsøkukonsertini, Prix Føroyar og Badmintonhøllini.

## Herverk á Tekniska Skúla í Klaksvík

**Valkvøldið hevur onkur oyðiligt einar 10 plátur av klædningum á skúlanum við Skúlaveg. Løgreglan leitar eftir gerningsfólkunum**

HERVERK
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Tekniski skúli var eitt av evnunum í valstríðnum í Norðoyggjum upp undir løgtingsvalið, og eftir øllum at døma hevur onkur verið misnøgdur eftir valið, tí valnáttina varð herverk gjørt á skúlan við Skúlavegin.

Einar 10 plátur av klædninginum eru sparkaðar inn og oyðilagdar, og skaðin verður mettur at kosta fleiri túsund krónur.

Løgreglan í Klaksvík kannar málið, men hevur eingi spor at ganga eftir uttan fótaspor á teimum brotnu plátum.

Tí vil løgreglan gjarna frætta frá fólki, sum hava sæð nakað illgrunasamt í nánd av skúlanum valkvøldið.

## Málningaframsýning í Riberhus



**Ian Luid fer komandi hálva aðru vikuna at sýna fram málningar í Riberhúsi**

FRAMSÝNING
*Tíðindaskriv*

Leygardagin 24. januar kl.16 letur málningaframsýning við Ian Luid upp í Riberhus í Fuglafirði.

Ian hevur seinast árið verði rættuliga virkin og eru allir málningarnar á framsýningini málaðir í hesum tíðarskeiðinum.

Tað er fyri stóran part føroyska náttúran og serstaka føroyska ljósið sum kemur til kennar í hansara málningum.

Tá framsýningin letur upp leygardagin fer ein av finalistinum í singer/ songwrither 2003 Ronnie Poulsen at framføra egin løg.

Framsýningin er opin frá leygardag 24.jan — mikudag 4. februar allar dagar frá 15.00 - 19.00.

## Sjónvarp til føroyingar í Danmark

**»Føroya Hornið« er ein sjónvarpssending, ið millum annað sýnir mentunnarlig, ítróttarlig og sosial tiltøk millum føroyingar í Danmark**

SJÓNVARP
*Tíðindaskriv*

Føroya Hornið, ið vendir sær til bæði lesandi, arbeiðandi og pensionistar o.s.fr., er at síggja hvønn fyrsta og triðja leygardag í mánaðinum millum kl. 11.30 og 12.00 á Københavns Kanal.

Í løtuni er tað sjálvandi føroyska løgtingsvalið, ið hevur størsta áhugan millum hyggjararnar.

Aftan fyri komandi sendingar stendur nú ein redaktión. Í henni sita Niels Salmony, sølustjóri, Martin Fjallstein, leiðari í Føroyahúsinum í Keypmannahavn, Kári Mikkelsen, journalistur, Erik Koch Jørgensen, sjónvarpsframleiðslustjóri og Kim Bay, sjónvarpsupptøkumaður. Persónar, ið hvør á sínum øki hava drúgvar royndir í til dømis sjónvarpsarbeiði, samskifti, leiðslu og pengaviðurskiftum.

Tørvurin á eini sjónvarpssending millum føroyingar í Danmark hevur leingi verið eitt ynski, sum nú er vorðið veruleiki. Longu nú verður Føroya Hornið stuðlað av kendum føroyskum fyritøkum sum Atlantsflog, Smyril Line og Føroya Sparikassa.

Fyri at Føroya Hornið kann halda fram og gerast betri, hevur sendingin brúk fyri framhaldandi stuðli. Tí hevur manningin vent sær til aðrar føroyskar fyritøkur fyri at søkja um stuðul.

Fleri upplýsingar ella viðmerkingar kunnu fáast við at venda sær til ein av stigtakarunum: Niels Salmony, fartlf. 0045 23 37 13 67, teldupostur: salmony@jwn.dk



# Eidesgaard stevnir móti Tinganesi

**Jóannes Eidesgaard fekk størstu undirtøkuna at leiða samráðingarnar at skipa eina nýggja samgongu. Tískil bendir alt á, at hann eisini verður Føroya løgmaður innan leingi**

FORMANSUMFAR
*Orð:Heri á Rógvi*
*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Jóannes Eidesgaard hevur nú møguleika bæði at gerast løgmaður og at fáa Javnaðarflokkin í Tinganes. Alfred Olsen og Sambandsflokkurin tryggjaðu saman við Sjálvstýrisflokkinum Jóannesi hendan møguleika.*

Jóannes Eidesgaard hevur fingið ein gyltan møguleika.

Hann og Javnaðarflokkurin stevna beint ímóti Tinganesi, og persónliga er hann ávegis at gerast løgmaður.

Sambandsflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Javnaðarflokkurin søgdu Edmundi Joensen, løgtingsformanni, frá, at teir vildu hava Jóannes Eidesgaard at leiða samgongusamráðingarnar. Hetta gav formanni Javnaðarfloksins meiraluta.

Og Jóannes ætlar sær beint til arbeiðis at finna ein nýggja samgongu. Fyrstu fundirnir vórðu hildnir hósdagin - eftir at blaðið fór til prentingar.

Fyrsti tingfundurin eftir løgtingsvalið verður 3. februar, og í seinsta lagi níggju yrkadagar eftir, hin 13. februar, er seinasta freist hjá løgtingsformanninum at leggja uppskot um fyrsta løgmansevni fyri Løgtingið. Hin 18. februar er seinasta freist hjá Løgtinginum at greiða atkvøðu um løgmansevni. Altso Jóannes Eidesgaard hevur eitt ávíst trýst á sær at skipa samgongu. Ber einki til hjá honum, so hevur hann skyldu at boða løgtingsformanninum frá hesum í góðari tíð, soleiðis at nýggjur samráðingarleiðari kann útnevnast.

### Beint til arbeiðis

Høgni Hoydal, formaðurin í Tjóðveldisflokkinum, fór sum tann fyrsti inn til Edmund Joensen í fundirhølunum á Miðhæddini í Løgtingsbygninginum beint eftir klokan tíggju hósmorgunin. Hann peikaði á seg sjálvan sum samráðingarleiðara.

– Okkara grundgeving er, at vit gjørdust størstu flokkur á tingi. Vit halda tað vera best, um tann størsti flokkurin sleppur at royna seg, sigur Høgni Hoydal.
Og so var leiðin løgd.

Næsti maður innar til tingformannin var Alfred Olsen, virkandi formaður Sambandsfloksins. Hann hevði sínar tingmenn - uttan Lisbeth L. Petersen og sjálvandi Edmund Joensen - við sær.

Alfred Olsen peikaði á Jóannes Eidesgaard.

– Vit meta, at Jóannes Eidesgaard hevur góðar møguleikar at skipa eitt breitt samgongusamstarv, sigur Alred Olsen.

Alfred Olsen metti ikki nóg góðar møguleikar vera til staðar fyri at skipa eina samgongu við at peika ein í Sambandsflokkinum.

Virkandi formaðurin í Sambandsflokkinum heldur, at góðir møguleikar eru fyri at koma í eina samgongu, og hetta kann gera, at fiaskoin týskvøldið verður vend til í øllum førum ein ávísan framburð.

– Tað er heilt avgerandi fyri okkum at koma í eina samgongu, sigur Alfred Olsen.

Tann triðji inni hjá Edmundi var Jóannes Eidesgaard, og hann peikaði á seg sjálvan.

Stóri atkvøðuslúkarin í Norðoyggjum, Anfinn Kallsberg, peikaði á seg sjálvan sum samgonguleiðari, tá hann var inni hjá løgtingsformanninum umboðandi Fólkaflokkin. Hetta gjørdi hann við teirri grundgeving, at hann helt seg hava fingið eina dygga álitisváttan frá fólkinum.

– Eg skildi føroyska veljaranum og demokratinum at bjóða meg fram, sigur Anfinn Kallsberg. Í sama viðfangi sigur hann, at hann sum persónur ikki skal vera ein trupulleiki fyri einum samgongusamstarvi, tá stóru flokkarnir ikki hava álit á honum.

Jenis av Rana peikaði á Høgna Hoydal. Hann vil fegin halda fast í verandi samgongu. Hann metti tað vera burturvið at peika á Anfinn Kallsberg, tá Tjóðveldisflokkurin hevur avvíst at samstarva við honum sum løgmanni.

– Vit hava tikið fylgjurnar av hesum og peika á hin stóra flokkin í samgonguni, sigur Jenis av Rana.

Hann sigur seg rokna við, at Jóannes Eidesgaard fer at royna eftir teimum stóru flokkunum fyrst.

Kári P. Højgaard fór sum tann síðsti til Edmund Joensen. Við sínum mandati gav hann Jóannesi Eidesgaard atkvøðu nummar fimtan. Kári P. Højgaard vísir á, at tað eisini snýr seg um sjálvan persónin, tá ein samráðingarleiðari skal veljast - og ikki bert flokkin.

– Sambandsflokkurin gjørdist størstu flokkur, og har eru ávísir trupulleikar í dag, og tískil vildu vit ikki peika á Sambandsflokkin. Tann næst størsti flokkurin er Javnaðarflokkurin, vit meta, at Jóannes Eidesgaard er ein royndur poltikari, sum hevur møguleikar at skipa eina samgongu.

### Breitt ella smælt

Beint eftir klokkan ellivu hósmorgunin kundi Edmund Joensen kunngera, at Jóannes Eidesgaard eigur møguleika at skipa eina samgongu

Jóannes Eidesgaar fer nú at "sortera" millum flokkarnar, sum hann tók til. Fyrstir á fund við hann eru Sjálvstýrisflokkurin og Sambandsflokkurin. Hann útilokar einki - allir møguleikar eru opnir.

– Ein ætlan skal gerast fyri, hvussu samráðingarnar skulu fara fram. Vit fara eftir einum meiralutastjórn, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann fer innleiðandi at tosa við nógvar flokkar, men ynski um eina breiða og stabila samgongu er framvegis til staðar.

– Vit skilda fólki at royna at fáa eina breiða samgongu, sum kann skapa arbeiðsfrið. Tí vil eg fegin síggja eitt breitt samstarv burturúr hesum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hvørki Jóannes Eidesgaard ella nakar annar floksleiðari vildi vátta, at nøkur avtala var gjørd flokanna millum undan formansumfarinum.

### Staðfesti støðuna

Formansumfarið hósmorgunin hevur fyrst og fremst Jóannesi Eidesgaard og Javnaðarflokkinum ein gyltan møguleika.

Samstundis var staðfest at verandi ósemja í teirra fráfarandi samgonguni stendur við. Hóast samgongan fekk størri undirtøku týsdagin enn við seinasta val, so er persónspurningurin um Anfinn Kallsberg ikki loystur, og tað er tí bert, um Jóannes Eidesgaard ikki megnar at skipa eina samgongu, at ein samgongu við fullveldi og sjálvstýri fremst á dagsskránni kann halda fram.

Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum heldur tað vera óheppið, at tað ikki hevur borið til at finna eina semju millum Fólka- og Tjóðveldisflokkin. Hann vísir til, at Fólkaflokkurin eigur ábyrgdina fyri samgongusliti - men Fólkaflokkurin sendir, eins og undan valinum, tann bóltin retur til Høgna Hoydal.

Inntil víðari liggur bóltinurin hjá Jóannesi Eidesgaard.



*Støðan er framvegis fastlæst millum Høgna og Anfinn. Hóast góða úrslitið valdagin, so kann lættliga henda, at bert annar teirra sleppur í samgongu.*